Skúlastýrisfundur 16.04.2024

Skrå:

1. Skúlalagið
2. Foreldrasamstarv
3. Heilsusystur
    a. Umsókn frá Vígdis Berg (AKT)
4. Reglugerð/vegleiðing fyri foreldraleiklut á skúlans øki
5. Ymiskt

Ad. 1

Johanna Hjelm og maðurin Gylfi Scheving hava latið Vágs Skúla stórfingna peningagávu. Vinalagið millum íslendsku familjuna Hjelm og Vágs Skúla stavar í roynd og veru frá einari lagnuhending fyri yvir 100 árum síðani.

Jóhanna er dóttur Sivar Hjelm, sum var føddur í Vági 21. des. í 1915. Sivar flutti til Íslands sum 12 ára gamal saman við mammu síni og stórum systkinahópi. Pápi Sivar, Jógvan Hjelm, gekk burtur við báti á útróðri av Vágseiði saman við brøðrum sínum Martin og Jaspur Hjelm og tveimum synum hjá Jaspur, Anton og Esbern, og Sofus Berg, ættaður úr Hvalba. Eftir at tey fluttu til Íslands, longdist Sivari altíð aftur til Vágs, og flutti hann eisini til Vágs í nøkur ár, eftir at hann var fermdur. Sivar tosaði altíð so hjartaliga um Vág.

Í hesum døgum er 50 ár síðani, Sivar andaðist. Dóttirin Johanna vil minnast pápa sín við at lata Vágs Skúla eina gávu.

Vágs Skúli er sera takksamur fyri gávuna og hevur samskift við Johannu & Gylfa um at brúka gávuna til ein fótbóltsvøll á skúlalaðnum. Fótbóltsvøllurin kemur at liggja partvís á núverandi skúlalagnum. Skotið verður upp at Vøllurin verður kallaður SIVARS vøllur.

Skúlastýrið fegnast eisini um gávuna og tekur undir við ætlanunum

Tjakast verður við um hvar á skúlalaðnum vøllurin skal vera. Vit taka upp samstarv við umsitingina hjá kommununi um endaliga staðseting.

Ad. 2

Skúlastýrið hevur havt samband við fleiri fyrilestrahaldarar um at koma og halda ein fyrilestur til ein felagsforeldrafund. Hetta hevur ikki eydnast. Skúlastýrið í Tvøroyrar skúla hevur fingið Snorra Paturson frá Fólkaheilsuráðnum at koma suður

at hava ein foreldrafund, fyri foreldrum at børnum í skúlanum. Vit ynskja at bjóða øllum foreldrum í oynni til hendan fundin.

Fundurin verður í Salt tann 15. maj. Tað kemur at snúgva seg um heilsuna hjá børnum, um orkudrykkir, sunnan mat og annað.

Ad. 3

Síðan seinasta skúlastýrisfund, har vit gleddust um at hava fingið ein heilsufrøðing i starv, er heilsufrøðingurin farin í annað starv. Hetta er harmuligt og als ikki nøktandi. Heilsufrøðingar í skúlunum hoyra undir Gigni og her siga tey at ongin søkir starvið. Vígdis Berg, lærari hevur áhuga í at nema sær útbúgving innan trivnað og AKT. Skúlastýrið tekur jaligt ímóti umsóknini og vil virka fyri og stuðla Vígdis í ynskjum hennara.

Ad. 4

Skúlastjórin reisir spurningin um reglugerð í samband við læraraleiklut og foreldraleiklut. Arbeitt verður víðari við hesum so skúlin er ætlan hevur ein vegleiðing klára til skúlaársbyrjan

Ad. 5

Skúlin hevur fingið nýggja heimasíðu, har møguleiki er at samskifta við lærarar skúlans umvegis netið. Hetta hevur lætt um arbeiðsbyrðuna hjá lærarunum.

Skúlastýrislimur førir fram, at tað er umráðandi at heimasíðan altíð er dagførd, soleiðis at tað er lætt at finna ymisku lærarnar at samskifta við.

D. Poulsen

Durita Poulsen

R Brattaberg

Rakul Borg Brattaberg

Birgir Jørgensen

Levi Mørk

Hjørdis R. Simonsen

Hjørdis R. Simonsen